# sum gandaorð



*Viberg Sørensen kann vera rættiliga áhugaverdur at lurta eftir, og soleiðis var eisini á fiskivinnutinginum í Norðurlandahúsinum, har hann hevði ein rættiliga áhugaverdan fyrilestur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

er hóast alt – og enn - tann fiskur, vit eru eymast um.

- Vit í reiðarafelagnum hava víst á, at vit eiga at gera okkum nógv størri ómak fyri at fáa meira burturúr toskafiskiskapinum. Vit mugu fyrst og fremst broyta hugburð. Eg kann ikki lata vera við at endurtaka, at vit í reiðarafelagnum her hava víst á gongdar leiðir.

Viberg segði, at vit hava lítla og onga ávirkan á, hvussu gýtingin vignast, men vit kunnu sjálvir gera av, hvussu vit fiska.

- Tá fiskurin er vaksin undan ringastu vandunum, er eftir okkara meting altavgerandi. Fiska vit tá rætt, er slottið vunnið, og restin kemur av sær sjálvum.

Hann vísti eisini á, hvussu toskafiskiskapur seinastu fimm árini hevur verið. Hann helt, at tað hevur verið heilt galið við støddarbýtinum.

- Vit hava sett eina talvu upp, sum vísir, hvussu fiskatalið er hjá ymisku bólkunum, og hvør miðalprísurin er fyri hvønn veiddan fisk. Hettar eru tøl, ið geva okkum nakað at hugsa um, legði formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, aftrat.

Felagið hevur á síni heimasíðu nevndu talvur, sum lesarar, ið vilja vita meiri um hesi sjónarmið, kunnu hyggja eftir.

vilmund@sosialurin.fo

## TØKK

Vit takka hjartaliga fyri samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi,verpápi og abbi okkara

**Jalgrím Hilduberg**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkara, sum fylgdu honum til gravar. Tøkk fyri heilsanir, kransar, blómur og gávur til Krabbameinsfelagið. Eisini takka vit tykkum á B6 og G3, sum vístu honum so stóra umsorgan, tá hann hevði hana fyri neyðini.

***Vegna familjuna***
**Berghild**
**Regin, Beinta, Eyðun, Unn og Durita**

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði pápi, og bróðir okkara

**Poul Beder**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Hera Joensen fyri troystarrík orð. Tøkk til kirkjutænarar, berarar og gravara. Takk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið. Takk fyri blómur og peningagávur. Ein serlig tøkk til tykkum sangarar/tónleikarar, ið gjørdu løtuna í Vesturkirkjuni so hátíðarliga.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu Poul til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

***Familjunnar vegna***
**Børnini**


16.-19. MAI:

VIÐ ÓLA TIL ÍSLANDS FYRI 2.345

ÍROKNAÐ: 1 KOYGGJA Í DEILDUM 4-KOYGGJUKAMARI + 2 x BUFFET + 3 x MORGUNMAT + 1 x MATPAKKA + BUSSÚTFERÐIR Í ÍSLANDI

VITJIÐ SLÓÐIR FØROYINGA Í ÍSLANDI

Komið við til Seyðisfjarðar 16. mai og upplivið Ísland saman við Óla Jacobsen, blaðmanni, sum fer at greiða frá ymiskum søguligum hendingum, sum føroyingar hava verið partur av. Vitjað verður á Norðfjørðinum, Vattarnesi og Seyðisfirði.



Óli Jacobsen verður við á túrinum sum frásøgumaður

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

TLF. 34 59 00
WWW.SMYRILLINE.FO